# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Altjóða samfelagið hevur tosað nóg leingi og nóg mikið um Zimbabwe. Nú má okkurt leggjast oman á orðini*

*Morgan Tsvangirai*

# Heimssamfelagið má leggja uppí í Zimbabwe

**Zimbabwiski andstøðuleiðartin, Morgan Tsvangirai, heldur, at nú hevur heimssamfelagið tosað nóg leingi um Zimbabwe. Nú má umheimurin taka sær um reiggj**

- Fáa vit ikki hjálp frá altjóða samfelagnum, fer Zimbabwe í upploysn.

Tað sigur Morgan Tsvangirai við bretska blaðið The Guardian. Tsvangirai er leiðari hjá zimbabwisku andstøðuni og var forsetavalevni hennara, til hann nú um dagarnar valdi at taka seg aftur. Avgerð hansara fekk trygdarráðið hjá ST at biðja stjórnina hjá Robert Mugabe, forseta avlýsa umvalið, sum er sett at vera fríggjadagin, men tað vil stjórnin ikki.

- Vit vilja ikki hava eitt vápnað stríð, men fólkið í Zimbabwe vónar, at heimsins leiðarar eru til reiðar at brúka vápnamegi oman á tey mongu orðini, sum vit hava hoyrt. Okkum tørvar friðarvarðveitandi hermenn, ikki ófriðarkroppar. Teir fremmandu hermenninir skulu skilja fólkið frá ófriðarkroppunum og verja ta demokratisku tilgongdina, sum Zimbabwe rópar eftir, sigur Morgan Tsvangirai við The Guardian.

## Neyvan hermegi

Hann vann fyrra umfar av forsetavalinum, sum var í mars, men sambært valnevndini fekk hann ikki tey neyðugu 50 prosentini av atkvøðunum. Tí hevur stjórnin lýst umval tann 27. juni, men áhaldandi ágangur fekk Tsvangirai at taka seg aftur sum valevni.

- Stríðið í Zimbabwe er eitt stríð ímillum demokrati og einaræði, ímillum rættvísi og órættvísi, ímillum rætt og rangt, sigur Tsvangirai.

Sambært The Guardian er tað ikki sannlíkt, at altjóða samfelagið fer at leggja uppí í Zimbabwe við hermegi. Amerikanski ST-sendiharrin, Zahmay Khalilzad, hevur sagt, at USA er til reiðar at biðja ST-trygdarráðið umhugsa onnur tiltøk, um stýrið hjá Robert Mugabe noktar at avlýsa seinna valumfar. Zimbabwiski forsetin hevur svarað, at valið verður, eisini um hann er einsamalt valevni.



*- Vit vilja ikki hava vápnað stríð, men eina herdeild at tryggja frið og demokrati, sigur Morgan Tsvangirai*

*Mynd: Polfoto*

# Clinton stuðlar Obama

**Fyri fjúrtan døgum síðani gavst Hillary Clinton í kappingini um at gerast forsetavalevni hjá amerikonsku demokratunum. Nú stuðlar maður hennara kappingarnmeytanum**



*Tað finnast ikki nógvar myndir av Barrack Obama og Bill Clinton saman. Hendan er frá 2005*

*Mynd: AP*

Bill Clinton er kortini so mikið varin, at hann hevur latið sín talsmann siga frá, at hann stuðlar Barrack Obama.

- Bill Clinton er sjálvandi til reiðar at tað, sum hann kann gera, um hann verður biðin um at virka við til at tryggja Barrack Obama forsetaembætið, sigur talsmaðurin hjá fyrrverandi forsetanum, Matt McKenna.

Orðini eru kanska plástur á sárið, tí einari røðu, sum Bill Clinton helt í gjár, nevndi hann ikki Barrack Obama, og hann svaraði heldur ikki, tá tíðindafólk spurdu hann, um hann stuðlar forsetavalevninum hjá demokratunum.

Hillary Clinton hevur harafturímóti boðað frá, at hon styðjar Obama, og hon hevur biðið sínar fremstu stuðlar gera tað sama.

## STUTT SAGT

### Týskland letur hermenn

Týska stjórnin umhugar í løtuni eina áheitan frá NATO um at senda fleiri hermenn til Afghanistan. Týskland hevur sum er 3.500 hermenn í Afghanistan, men stjórnin umhugsar at senda 1.000 hermenn hagar afturat. Franz Josef Jung, verjumálaráðharri, at teir týsku hermenninir fáa støð har norðuri í Afghanistan, har teir skulu hjálpa afghanum at endurbyggja landið. Tað hevur verið friðarligt har norðuri í Afghanistan samanborið við viðurskiftini har suðuri í landinum, men sum skilst er støðan versnað har norðuri í seinastuni. Síðani 2002 hevur Týskland mist 26 hermenn í Afghanistan, skrivar DPA.

### Eingi skotvápn við sær

Í Turkalandi er tað vanligt, at fótbóltsáskoðarar taka skotvápn við sær, tá teir skulu fegnast um ein sigur. Tann siðurin kann koma fram í kvøld, um tað skuldi hent, at Turkaland vinnur á Týsklandi í hálvfinaluni í EM. Men skotvápn eru vandamikil, eisini í fagnaði, og tí hevur turkiski forsætisráðharrin, Recep Tayyip Erdogan, heitt á turkar um at lata skotvápnini liggja eftir við hús í kvøld, skrivar AP. Sagt verður, at umleið 20 fólk vórðu særd av skotsárum tá turkar í síðstu viku fegnaðust um EM-sigurin á Krtoatia.



*Turkar kunnu skjóta á vøllinum, men ikki uttanfyri*

*Mynd: AP*